# Byrjaði við einum kavakríggi



Sóley J. Klementsen, nú Samuelsen, og Tór Arni Samuelsen vóru fyrsta brúðarparið, ið kundi fáa annað enn bara vælsignilsi frá samkomuni Filadelfia við Landavegin. Hetta var fyrsta ferðin, at tað løgfrøðisliga eisini varð ornað í Filadelfia

**Filadelfia var leygardagin karmur um fyrsta rættiliga brúdleypið ein samkoma í Føroyum nakrantíð hevur havt. Kirkjan hevur verið einasti vígslumyndugleiki í Føroyum, men nú hava samkomur kring landið eisini fingið henda myndugleika**

BRÚÐARVÍGSLA

*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Fyrsta rættiliga brúdleypið vil siga, at hetta er fyrsta ferðin, at ein samkoma hevur kunnað givið brúðarparinum meira enn sítt vælsignilsi. Áður hevur tað verið soleiðis, at um brúðarparið ynskti ikki at giftast í kirkju, varð parið vígt á fútaskrivstovuni, fyri at fáa tað løgfrøðisliga frá hond, og síðani varð vælsignilsi givið í samkomuni.

Men fyri stuttari tíð síðan hava nakrar samkomur í Føroyum fingið vígslumyndugleika, sum kirkjan áðrenn hevði einarætt uppá. Og leygardagin var Filadelfia karmur um fyrsta brúdleypið, har tað løgfrøðisliga og tað »vanliga« var gjørt í samkomuni.

## Kavakríggj

Alt byrjaði við einum kavakríggi fyri átta árum síðani. Tór Arni og Sóley hava bæði altíð gingið í Filadelfia.

– Tór Arni flutti til Havnar í 1994, men tá legði eg ikki rættiliga merkis til hann. Vit hava altíð gingið í Filadelfia, men tað var ikki fyrr enn aftaná eitt kavakríggj í 1996, at vit komu at kennast. Vit vórðu rættiliga góðir vinir, men vit komu ikki saman fyrr enn í desember 1999, greiðir brúðurin, Sóley, nú Samuelsen, frá.

Tann 2. juni í 2001 tóku tey bæðið ring uppá, og nú eitt ár seinni eru tey gift.

Vígslan gekk fyri seg á tann hátt, at pápi brúðrina leiddi hana inn til brúðgómin. Síðani varð boðið vælkomið, og síðani var sangur. Eftir eina talu, og Amazing Graze á fagott og gittar varð sjálv vígslan. Tummas Jacobsen, samkomuleiðari í Filadelfia, gifti tey bæði, Sóley, 22 ár, og Tór Arna, 29 ár.

Í Filadelfia var rættiliga nógv fólk samankomið.

– Tað kendist meira ordiligt, at vit kundu orna alt á einum staði, sigur Sóley.

– Soleiðis hevði ein kanska betri stýr á tí sjálvur, og tað var eisini nakað serligt við at kunna orna alt í Filadelfia. Sjálv haldi eg, at tað riggaði ógvuliga væl.

Ístaðin fyri tað, sum prestur ella annar almennur myndugleiki, vanliga brúka, vóru orðini, ið Tummas Jacobsen brúkti umsett úr enskum.

Aftaná vígsluna í Filadelfia var reseptión, og brúðarparið fór at taka brúðarmyndir. Um kvøldið var veitsla fyri innbodnum í Pálsstovu.

Sosialurin ynskir brúðarparinum hjartaliga tillukku.



Mamma brúðrina, Vígdis Johannesen, hjálpir dóttrini við brúðarbukettini. Pápin, Marius Klementsen í bakgrundini.



Filadelfia var leygardagin karmur um fyrsta samkomubrúdleypið, har samkoman sjálv var vígslumyndugleiki. Tummas Jacobsen, samkomuleiðari, vígdi tey bæði, Sóley J. Klementsen og Tór Arna Samuelsen

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra dóttir, systir og mostur

**Marita Jacobsen**
Tórshavn, f. 19.03.1951

andaðist leygardagin 1. juni 2002.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 5. juni kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Håkon, Marja, Elin og Rúna**



# Í føðingardegi hjá Pedagodfelagnum

MÓTTØKA

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Finnus Justinussen, myndir*

Leygardagin seinnapartin í øllum regninum var móttøka í felagshúsinum hjá Pedagogfelagnum í Tungugøtu í Havn í samband við at felagið fylti 20 ár. Felagið var stovnað í 1982, men akkurát hvussu søgan hjá felagnum er tvey tey fyrstu árini er ilt at siga, tí onki skrivligt tilfar er tókt frá hesum tíðarskeiði. Í fyrstuni vóru 80 limir í felagnum og í dag eru teir 1100. Pedagogfelgið er vorðið eitt stórt felag og formaðurin Carita Bjrøklund, er væl umtóktur millum limirnar.

Í samband við dagin fingu allir limirnir eina gávu. Bárður Jákupsson hevur gjørt 16 ymisk steinprent og grafiski verkstaðurin í Listaskálanum hevur prentað 100 eintøk av hvørjum. Hesi eru send til limirnar.



Frá vinstru. Varaleiðarin á Dagstovninum í Hoyvík Johanna Olsen og leiðarin á sama stovni Ingun H. Pedersen her saman við Jógvan Petersen, sum síðan einaferð í sekstiárunum hevur starvast sum pedagogur og leiðari, men nú er farin frá við pensión. Áðrenn arbeiddi Jógvan sum timburmaður og hann er ættaður úr Oyndarfirði



Carita Bjørklund, formaður og Anna Elisabeth Joensen, næstformaður



Katrin Thomassen, umsitingarleiðari hjá Pedagogfelagnum og formaðurin tosa við Gunnleiv Dalsgaard, formann í Starvsmannafelagnum



Hesar fingu vit ikki navnið á, men tær eru pedagogar og vitjaðu felagið leygardagin


Hjá okkum situr tú væl



Leður
Luft

Rúmligt, fjálgt og hugnaligt. Betri pláss til beinini og setur úr leðri í øllum flogfarinum. Atlantic Airways hevur enn einaferð gjørt tað høgligari at flúgva.

Vit hava innrættað kabinuna av nýggjum og tikið eina stólarekkju úr, so tað er vorðið munandi meiri rúmsátt hjá okkara ferðafólki. Vit hava eisini skift allar teir gomlu stólarnar út við fjálg leðursetur, so øll flúgva á fyrsta klassa hjá okkum.

Inni hjá okkum situr tú væl, meðan skipari og manning syrgja fyri, at tú fært ein góðan túr.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo